## Kjartan Eli og Marin útsligin

Tað eydnaðist ikki Kjartan Eli Hentze og Marin í Dali at røkka longri enn kvartfinaluni í blandaðum tvímansleiki. Tað gekk annars stak væl hjá Kjartan Eli Hentze og Marin í Dali, sum í 1/8-finaluni vunnu á einum sera sterkum pari av Rodos. Í kvartfinaluni møttu tey somuleiðis einum pari av Rodos, men hesaferð máttu tey bæði boygja seg. Dysturin endaði 3-0 til liðið av Rodos, hóast talan var um ein javnan dyst. Settini endaðu 11-9, 13-11 og 11-8.




## Rigmor rennur ikki 10.000

Hóast hon er skrivað upp til luttøku í 10.000 metra renningini hósdagin, so verður Rigmor N. Arge ikki við í feltinum. Avgerðina hevði hon tikið, longu undan oyggjaleikunum, og hon varð eisini staðfest, tá hon hevði runnið hálvt marathon.

# Kunnu fáa enn fleiri gull



*Pál Joensen, sum her svimur firvald á stafettini, er eitt sera gott boð upp á enn eitt gullmerki til føroyska svimjiliðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast svimjilandsliðið væl og virðiliga hevur sett føroyskt met í gullsavnan, so tykjast tey enn ikki hava nakran hug at steðga í strembanum sínum**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Super-optimist varð Kristian Olsen róptur í blaðnum í gjár, tá hann hevði luftað tankanum um, at Føroyar kundu vinna 11 gullmerki í svimjing á oyggjaleikum.

Á triðja og næst seinasta kappingardegnum á oyggjaleikum varð málið longu rokkið. Men fyri tað tykist landsliðsvenjarin ikki at vera mist fótafestið í ovfarakæti.

- Tí tað hevur ikki verið heilt optimalt. Vit hava havt marginalarnar ímóti okkum í dag.

- Og so er eisini ein kiksari komin í fyrireikingarnar hjá okkum, hóast vit hava roynt at gjørt okkara allarbesta. Tí á hotellinum, har vit búgva, er øgiliga nógv vatn. Har eru ein rúgva av svimjihyljum, og tað ger, at moyggjabitar stórtrívast á staðnum. Eitt nú hevur Kristian Olsen fingið nógv bit, og tað kostar. Allur kroppurin er í einum konstantum kampi móti øllum hesum sárunum, og tí er Kristian í løtuni ikki meira enn 80-90% av sær sjálvum í løtuni. Tað hevur kostað, og tí sært tú eisini, at hann er glaður um eina bronsu á 100 metrum. Hann hevði kunnað fingið gull, hevði hann havt optimalar møguleikar. Og tíverri hava vit – eins og fleiri av hinum ítróttafólkunum – hendan trupulleikan at dragast við.

- Men sjálvandi hava onnur ting gingið heilt væl. Tað er kanska frekt at vera ónøgdur, og tað eri eg heldur ikki. Men heilt optimalt hevur tað ikki verið.

### Øll trýsta hvønnannan

Tað at elitan í svimjingini er vorðin somikið breið. Tað er væl tað, sum ger, at vit brádliga síggja tey úrslitini, sum vit hava verið vitni til seinastu dagarnar?

- Vit hava bæði hjá gentum og dreingjum fingið fleiri, sum kappast frammi í oddinum. Tey skiftast um at vinna á hvørjum øðrum, og tað er fínar greiðir fyri svimjingina. Eg gleði meg bara til, hvat tað næsta verður. Eg gleði meg til næsta ár og at síggja, hvat hesi kunnu blíva til.

Hósdagurin er enn eftir at svimja, og vit spurdu eisini Jón, hvørt hann metti, at Føroyar eisini hava møguleika fyri enn fleiri svimjigullum.

- Pál skal í hylin í 400 frí. Og hann setti teir allar upp á pláss í 200 frí, sum er veikasti teinurin hjá honum. 400 og 800 metrar eru hansara stóra styrki, so hann skal nokk smyrja teir av, um ikki eitt klaver dettur niður á nakkan á honum í nátt.

**Føroysku finalurnar mikukvøldið**

| Svimjari | Tíð | Pláss |
|---|---|---|
| **100 metra bringa, menn** | | |
| Beinir Danielsen | 1.02,02 | 6 |
| **400 metra frí, kvinnur** | | |
| Jutta Thomsen | 4.26,17 | 2 |
| Mona Simonsen | 4.33,00 | 6 |
| **200 metra rygg, menn** | | |
| Kári á Høvdanum | 2.07,14 | 4 |
| Høgni Miné Rasmussen | 2.15,91 | 6 |
| **100 metra bringa, kvinnur** | | |
| Malan Bærentsen | 1.17,23 | 5 |
| **100 metra frí, menn** | | |
| Kristian Olsen | 53,71 | 3 |
| Dánjal Martin Hofgaard | 54,12 | 5 |
| **50 metra frí, kvinnur** | | |
| Elspa Mørkøre | 27,24 | 1 |
| Shaila milum Garðarnar | 27,43 | 2 |
| **200 metra rygg, kvinnur** | | |
| Elspa Mørkøre | 2.18,59 | 1 |
| **4X100 metra blandað, menn** | | |
| Kári á Høvdanum | 59,04 | 1 |
| Dánjal Martin Hofgaard | 2.08,09 | |
| Pál Joensen | 3.06,53 | |
| Kristian Olsen | 4.00,38 | |
| **4X100 metra frí, kvinnur** | | |
| Shaila millum Garðarnar | 59,84 | 1 |
| Mona Simonsen | 2.01,32 | |
| Jutta Thomsen | 3.01,88 | |
| Elspa Mørkøre | 3.59,94 | |